# Íkast úr Føroyum

### Feløgini handan evnislistan 2018 – Føroyar

Tað er meginfelagið MEGD, ið sendir føroysku frágreiðingina inn vegna limafeløgini. MEGD er meginfelag fyri 24 limafeløg, ið umboða tann fjølbroytta skaran av fólki í Føroyum, ið ber brek. Yvirskipaða politiska endamálið hjá MEGD er at betra um rættindini hjá teimum, ið bera brek, uttan mun til slag av breki. Harumframt samstarvar MEGD við norðurlendsku meginfeløg teirra, ið bera brek. Einstøku limafeløgini í MEGD stremba eftir at betra um livikor og rættindi hjá teimum, ið bera brek, á teirra serstøku brekøki.

Føroyar eru sjálvstýrandi tjóð í danska kongsríkinum. Føroyar eru 18 oyggjar í Norðuratlantshavi miðskeiðis millum Skotland, Ísland og Noreg. Samfelagið er lítið við um leið 51.000 íbúgvum. Umsitingarliga eru oyggjarnar býttar í seks sýslur og 29 kommunur við sjey stjórnarráðum. Føroyska samfelagið er býtt ímillum land (Føroya Landsstýri) og kommunur, og landsstýrið eigur stóran lut í ábyrgdini av útreiðslum til útbúgvingar-, heilsu- og sosiala vælferðarøkið.

# I. Aðalendamál og -skyldur

### A. Aðalendamál og -skyldur (Grein 1-4)

1. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at samtykkja eina miðvísa brekpolitiska virkisætlan til tess at seta ST-sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek, í verk (nr. 11). Hesum tilmæli hevur landsstýrið ikki fylgt.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Nær ein miðvís brekpolitisk virkisætlan um at íverkseta ST-sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek, væntast at verða framløgd.*

2. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at tryggja, at ST-sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek, varð innlimaður í almenna lóggávu og sostatt gjørdist partur av galdandi lóg í Føroyum (nr. 13).

Farið er undir hetta arbeiðið, men tað dregur út.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Stig til at tryggja, at ST-sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek, verður innlimaður í almenna lóggávu og sostatt gerst partur av galdandi lóg í Føroyum.*

3. Í 2014 varð eftir tilmæli ein skipaður samstarvsleistur, "Tann góða tilgongdin", settur í verk fyri børn við autismu. Hetta skuldi tryggja eitt samskipað heildartilboð við dygdargóðum samstarvi millum avvarðandi myndugleikarnar á ymisku økjunum. Góðar royndir hava verið við hesum arbeiði, men eingin "góð tilgongd" er gjørd fyri familjur og

børn við menningartarni, ið hava tørv á eini ítøkiligari ætlan og serkønum persóni við ábyrgd av einum samskipaðum heildartilboði til børn við menningartarni.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at øllum børnum við menningartarni verður veitt eitt samskipað heildartilboð við dygdargóðum samstarvi millum avvarðandi myndugleikarnar á ymisku økjunum, sostatt at hjálp og stuðul gerast samanhangandi og munadygg.*

## II. Ávís rættindi (Grein 5-30)

### Javnrættindi og eingin mismunur (Grein 5)

4. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, inniliga Føroya Landsstýri til at samtykkja nýggja almenna lóggávu ímóti mismuni á øllum økjum, eisini uttan fyri arbeiðsmarknaðin (nr. 15). Nevndin mælti eisini Føroya Landsstýri til at taka stig til at tryggja, at munadygg rættartiltøk vóru tøk hjá fólki, ið bera brek, harímillum møguleiki fyri at kæra um mismun. Hetta er ikki gjørt.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Nær nýggj almenn lóggáva ímóti mismuni á øllum økjum, eisini uttan fyri arbeiðsmarknaðin, sum eisini staðfestir, at vantandi rímilig tillaging er at meta sum mismunur vegna brek, verður samtykt.*

b) *Átøk fyri at tryggja møguleika fyri at kæra um mismun vegna brek til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.*

### Tilvitskustimbran (Grein 8)

5. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at evna og samtykkja eina ætlan við ítøkiligum og sjónligum málum í samráði við feløgini hjá teimum, ið bera brek, fyri at vekja samfelagstilvitskuna – hjá almenninginum sum heild, hjá almenna og privata geiranum og hjá teimum, ið sjálv bera brek – og fyri at skapa eina jaliga mynd av teimum, ið bera brek, og økja um vitanina um rættindi teirra (nr. 23). Hetta er ikki gjørt.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita:*

a) *Eina støðulýsing av samtyktini av eini ætlan við ítøkiligum og sjónligum málum fyri at vekja samfelagstilvitskuna og fyri at skapa eina jaliga mynd av teimum, ið bera brek, og økja um vitanina um rættindi teirra.*

### Atkoma (Grein 9)

6. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at samtykkja eina víðfevnda ætlan, sum skuldi tryggja, at allir persónar, ið bera brek, hava atgongd til hentleikar, upplýsing og tilboð, og sum innibar ítøkilig mál, tíðarkarmar, fíggjarætlanir, revsitiltøk og eftirmeting.

Í 2017 varð Byggireglugerðin samtykt.[1] Hetta er eitt stig rætta vegin. Men atkoma er ein stór avbjóðing í føroyska samfelagnum á fleiri økjum – t.d. viðvíkjandi bygging, flutningi og samskifti.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Nær ein ætlan um undirvísing í algildari sniðgeving og atkomustandardum fyri viðkomandi yrkisbólkar, sum eisini inniber revsitiltøk ímóti teimum, ið ikki eftirlíka krøvunum, ið ásett eru í Byggireglugerðini frá 2017, væntandi verður framløgd.*

b) *Átøk fyri at tryggja, at almenn flutningsfeløg sum Strandfaraskip Landsins[2] og privatir veitarar sum Bygdaleiðir[3] og aðrar tænastur eftirlíka atkomukrøvunum.*

c) *Tíðarkarm um samtykt av reglum viðvíkjandi talgildari atkomu og atgongd til upplýsingartøkni og samskifti eins og ætlanir um átøk fyri at skunda undir almennar stovnar at taka ábyrgd viðvíkjandi framløgu av upplýsingum og samkifti á teirra heimasíðum í atkomuligum sniði sambært altjóða standardum.*

7. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at tryggja teimum, ið eru deyv og hoyrnarveik, atgongd til allar sjónvarpssendingar hjá KvF[4].

KvF er Føroya einasta almenna sjónvarpstænasta, ið varpar heimatíðindi og føroyskar sendingar. Síðan 2017 er ein røð av heimildarfilmum vorðin tekstað, og teknmálstulkur hevur verið knýttur at tíðindunum. Tað er tó als ikki nøktandi, at tekstur og teknmálstulkur bert eru tøkir í sambandi við sendingar, ið mettar eru at vera av "stórum samfelagsligum áhuga og týdningi".

Børnum, ið samskifta á øðrvísi hátt, tørvar eisini barnasendingar við teknmáli.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Ætlanir um at tryggja, at allar føroyskar sjónvarpssendingar hjá KvF gerast atkomuligar hjá teimum, ið eru deyv og hoyrnarveik.*

b) *Ætlanir um at tryggja, at barnasjónvarpssendingar eisini gerast atkomuligar hjá børnum, ið eru deyv ella hoyrnarveik, og hjá teimum, ið samskifta á øðrvísi hátt.*

### Rætturin til sjálvstøðugt lív og til at luttaka í samfelagnum (Grein 19)

8. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at broyta lóggávuna um almennar tænastur soleiðis, at persónar, ið bera brek, frítt kunnu velja, hvar tey vilja

---

[1] Lógasavnið. Kunngerð um bygningskunngerð 2017: https://logir.fo/Kunngerd/72-fra-27-06-2016-um-um-bygningskunngerd-2017
[2] Strandfaraskip Landsins: https://www.ssl.fo/
[3] Bygdaleiðir. https://www.ssl.fo/
[4] Kringvarp Føroya: https://kvf.fo/

búgva, og hvørjum tey vilja búgva saman við, samstundis sum tey fáa neyðuga stuðulin til at liva sjálvstøðugt (nr. 43).

Tað er ógvuliga sjálvsamt, at tey, ið bera brek, kunnu velja, hvar tey vilja búgva, og hvørjum tey vilja búgva saman við, samstundis sum tey fáa neyðuga stuðulin til at liva sjálvstøðugt. Langur bíðilisti er, og fólk, ið bera brek, kunnu vænta at standa á listanum í fleiri ár, og tá eru almennu tænasturnar avmarkaðar. Harumframt er eingin lóg, ið verjir tey, ið bera brek, tá ið verkfall er. Nógv hava verið noydd at flyta úr egnum heimi til familju ella størri búfelagsskapir, tá ið verkfall hevur verið.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Ætlanir um at byggja fleiri tíðarhóskandi bústaðir, sum lúka krøvini í Byggikunngerðini frá 2017,[5] sum rúma ymiskleika, sum ikki eru ov stórir, og sum nøkta ymiskar tørvir, soleiðis at fólk, ið bera brek, kunnu velja, hvar tey vilja búgva, og hvørjum tey vilja búgva saman við.*

b) *Ætlanir um at verja fólk, ið bera brek, soleiðis at tey ikki noyðast at flyta úr egnum heimi, tá ið verkfall er á arbeiðsmarknaðinum.*

### Talufrælsi, meiningarfrælsi og atgongd til upplýsingar (Grein 21)

9. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at viðurkenna rættin hjá øllum deyvum og hoyrnarveikum at fáa undirvísing og at samskifta á teknmáli; at seta mundadygg tiltøk í verk fyri at stuðla teknmáli sum samskiftishátt; at fremja gransking í teknmáli, harímillum at útgeva eina teknmálsorðabók; umframt at stuðla nýtsluni av føroyskum teknmáli á øllum økjum í lívinum hjá deyvum persónum við tí endamáli at tryggja luttøku teirra í arbeiði, útbúgving og mentanarlívi (nr. 45).

Føroya Landsstýri viðurkendi føroyskt teknmál sum mál hin 5. juni 2017, og við hesum fekk Málráðið,[6] ið er sett at røkja, menna og verja føroyska málið, ein lim úr deyvasamfelagnum. Somuleiðis er ein teknmálsorðabók útgivin.

Hóast kunngerð um undirvísing í og á teknmáli er gjørd, er eingin undirvísing í føroyskum teknmáli. Feløgini gera vart við, at børn við CI (Cochlear Implant) ikki fáa neyðug framhaldsskeið og undirvísing, hvat samskifti viðvíkur. Eingin gransking er, ið t.d. kann stuðla teknmáli sum samskiftishátt.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at verja og styrkja føroyska teknmálið sum samskiftishátt.*

b) *Ætlanir um at seta í verk undirvísing í og á teknmáli.*

c) *Ætlanir um at seta í verk gransking av teknmálsnýtslu í Føroyum.*

---

[5] Lógasavnið. Kunngerð um bygningskunngerð 2017: https://logir.fo/Kunngerd/72-fra-27-06-2016-um-um-bygningskunngerd-2017

[6] Málráðið: http://malrad.fo/

10. Feløgini gera vart við, at almennir stovnar ikki hava upplýsing á teknmáli.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at almennar upplýsingar verða tøkar á teknmáli.*

11. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til javnbjóðis viðurkenning av menningini og stuðlinum av alternativum samskiftishættum, ið tøkir eru hjá teimum, ið bera vitborin og sálarlig brek (nr. 49).

Sum er, er eingin skipað ætlan fyri menning og stuðli av víðkaðum og øðrvísi samskiftishættum.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Ætlanir um menning og stuðul av víðkaðum og øðrvísi samskiftishættum, ið eru ætlaðir teimum, ið bera vitborin og sálarlig brek.*

**Útbúgving (Grein 24)**

12. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at broyta lóggávuna fyri at tryggja luttøku hjá øllum børnum, ið bera brek, í vanligu útbúgvingarskipanini við nøktandi stuðli og tillaging, serstakliga við nøktandi útbúgving av lærarum og øðrum starvsfólki í skúlaverkinum til tess at tryggja dygd í útbúgvingini hjá næmingum, ið bera brek (nr. 53).

Føroyska fólkaskúlalógin vísir á týdningin av at hava ein skúla fyri øll, ið samsvarar við Salamanca-yvirlýsingina. Kortini eru avbjóðingar í fólkaskúlanum fyri næmingar, ið bera brek, innan autismuøkið, næmingar við menningartarni umframt næmingar, ið eru deyvir ella hoyrnarveikir. Teir kenna seg javnan útihýstar frá felagsskapinum.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at lærarir, ið undirvísa næmingum, ið bera brek, altíð hava neyðugu vitanina og yrkisførið til at tryggja hádygd í útbúgvingini.*

b) *Átøk fyri at tryggja øðrvísi undirvísingartilfar til næmingar, ið bera brek og hava tørv á hesum.*

13. Børn við menningartarni skulu hava munadyggan málsligan stuðul tíðliga. Sernám[7] er ikki ført fyri at røkka øllum børnum, og tað gerst tilvildarligt, hvør fær nøktandi málsligan stuðul.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

[7] Sernám: https://www.sernam.fo/

a) *Átøk fyri at tryggja børnum, ið bera brek, vanliga málsliga menning í fólkaskúla og barnagarði.*

**Heilsa (Grein 25)**

14. Persónar, ið bera brek, skulu hava atgongd til heilsutænastur. Men eingin yvirskipaður politikkur er, ið tryggjar persónum, ið bera brek, fyribyrgjandi heilsutænastur. Hetta hevur við sær, at persónar, ið bera brek, t.d. fáa staðfest krabbamein seint í sjúkugongdini.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at persónar við menningartarni fáa tilboð um regluligar fyribyrgjandi kanningar.*

15. Í Føroyum hava persónar við sálarsjúku einki bráðfeingisstað at venda sær til. Vit hava skaðastovur, ið taka sær av likamligum sjúkum, men tær hava ikki yrkisførleika til at hjálpa persónum við bráðkomnum sálarsjúkum. Eingin beinleiðis telefonlinja er heldur til persónar við sálarsjúku at ringja til og fáa hjálp ella ráðgeving í neyðstøðu.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at persónar við sálarsjúku fáa eina sálarsjúkuskaðastovu at venda sær til umframt bráðfeingis telefonráðgeving.*

16. Feløgini gera vart við, at servitan innan oligofreni ikki er nøktandi. Ráðgevar koma úr Danmark tvær ferðir um árið, og heilivágur verður javnan fyriskipaður gjøgnum telefon.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Ætlanir um at tryggja persónum við menningartarni og sálarsjúku betri framhaldsviðgerð og munadygga hjálp.*

17. Feløgini gera vart við, at heilsuverkið vantar tænastu við teknmálstulki í neyðstøðum.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja persónum, ið tørva teknmálstulk í neyðstøðum, hesa tænastu.*

18. Feløgini gera vart við, at persónar við varandi sjúkum sum t.d. minnissvinni ikki verða kannaðir og sjúkur teirra ikki greinaðar.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at persónar, ið hava tørv á at verða kannaðir, fáa sína sjúku greinaða.*

**Venjing og endurvenjing (Grein 26)**

19. Í Føroyum er eingin heildarskipan av venjing og endurvenjing. Hetta hevur við sær, at persónar við varandi sjúkum sum t.d. parkinson ikki fáa tryggjað eina endurvenjingar- og venjingarætlan. Útreiðslurnar til neyðugu støðugu venjingina kunnu vera stórar, av tí at viðkomandi persónar noyðast at rinda part av teimum sjálvir.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja ókeypis endurvenjing/venjing fyri persónar við varandi sjúkum.*

b) *Átøk fyri at styrkja endurvenjingartænasturnar við eitt nú veiting av ráðgeving, vitan og kropsvenjing, til tess at persónar við varandi sjúkum og teirra familjur verða útgjørd til at handfara sjúkuna og við hesum fáa betri lívsdygd.*

Feløgini gera vart við, at arbeiðsgevarar ikki hava nøktandi atgongd til teknmálstulking, og at arbeiðsgevarar ikki fáa tilboð um skeið í teknmáli.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at arbeiðsgevarar fáa atgongd til munadygga teknmálstulking og tilboð um skeið í teknmáli.*

**Arbeiði og starvssetan (Grein 27)**

20. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at seta neyðug tiltøk í verk til tess skjótast gjørligt at tryggja, at talið hækkar munandi á teimum, ið bera brek, og sum arbeiða á opna arbeiðsmarknaðinum (nr. 59).

Í Føroyum er eingin skipan, ið tryggjar eitt ómakaleyst samband millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at fleiri fólk, ið bera brek, koma út á arbeiðsmarknaðin.*

**Luttøka í politiska og almenna lívinum (Grein 29)**

21. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at broyta viðkomandi lógir, harímillum lóg um løgtingsval og kommunuval, soleiðis at øll tey, ið bera brek, kunnu útinna rætt sín at greiða atkvøðu og stilla upp til val, sama um tey hava ein verja ella eru umfatað av aðrari skipan. Nevndin mælir harumframt til, at atgongd til atkvøðuseðlar, valtilfar og valstøð verður tryggjað, og at valfríur, hóskandi og neyðugur stuðul verður veittur til tess at lætta um atkvøðugreiðsluna hjá teimum, ið bera brek (nr. 61).

Persónar við menningartarni kunnu hava veikt talumál og torført við at lesa, og blindir persónar hava ongan møguleika fyri at greiða atkvøðu uttan hjálp. Atkvøðuseðlarnir síggja allir eins út við nógvum nøvnum á einum longum lista. Ongar myndir eru av teimum, ið stilla upp, og ikki er gjørligt at greiða atkvøðu talgilt.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at atkvøðuseðlar við myndum av teimum, ið stilla upp, verða tøkir, og at atkvøðuseðlarnir talgildast, til tess at fólk við menningartarni og blind kunnu greiða atkvøðu sjálv uttan hjálp.*

# III. Ávísar skyldur (Grein 31-33)

## Hagtals- og dátuinnsavning (Grein 31)

22. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, Føroya Landsstýri til at skipa innsavningina, greiningina og miðlingina av dátum, býtt eftir kyni, aldri, breki og øki; at betra um førleikamenningina; og at menna kyns- og aldursbundnar indikatorar (nr. 65).

Sum er, er eingin dátuinnsavning av hagtølum viðvíkjandi persónum, ið bera brek, í Føroyum. Sostatt eru ongar almennar, greinaðar dátur um persónar, ið bera brek.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Ætlanir um at gera eina skipaða innsavning, greining og miðling av dátum, ið kann lýsa persónar, ið bera brek, teirra lív og tørvir og stuðla einum hugburði til brekøkið, ið er grundaður á menniskjarættindi.*

## Innlendis ígildisetan og eftirlit (Grein 33)

23. Í 2014 mælti ST-nevnd teirra, ið bera brek, til, at almenna samfelagið og serliga feløgini, ið umboða persónar, ið bera brek, støðugt hava eftirlit við, at sáttmálin verður settur í verk. Føroya Landsstýri eigur eisini at seta neyðug tiltøk í verk til tess at stovna ella tilnevna eina samskipan og eina uttanveltaða eftirlitsskipan í Føroyum. Nevndin mælir eisini Føroya Landsstýri til at seta ein menniskjarættindastovn við tí endamáli at fremja og verja menniskjarættindini sambært París-aðalreglunum.

Í Føroyum er eingin embætismannanevnd, ið fevnir um fleiri aðalráð. Almannamálaráðnum[8] er litið upp í hendurnar at samskipa íverksetanina av ST-sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek. Tó er eingin uttanveltað eftirlitsskipan í Føroyum.

*Føroya Landsstýri verður biðið um at veita upplýsingar um:*

a) *Átøk fyri at tryggja, at almenna samfelagið og serliga feløgini, ið umboða tey, ið bera brek, støðugt hava eftirlit við, at sáttmálin verður settur í verk.*
b) *Ætlanir um stovnanina av eini uttanveltaðari eftirlitsskipan í Føroyum.*

---

[8] Almannamálaráðið: https://www.amr.fo/